## Morgungron

Tað kemur neyvan óvart á menn, at ein bretsk kanning nú vísir, at munandi fleiri kvinnur enn menn hava morgungron, og at eisini tekur teimum longri tíð at sleppa av við tað lúnuta lagið. Bretska kanningin sigur, at 24 prosent av øllum monnum hava ongantíð morgungron, men at bara 13 prosent at kvinnunum kunnu rósa sær av tí. Umberingin sigst vera, at kvinnurnar sova verri um náttina, og at tær hava meiri at gera um morgunin.

## Hugnakvøld

Mánakvøldið fara skálavíkingar og onnur at hugna sær í Kelduni í Skálavík. Tá verður skipað fyri einum hungnakvøldi, har Marna Skylv Sørensen og Brynja Trondesen fara at vísa tað nýggjasta innan hár- og klædnamóta, og mótaserfrøðingurin Hans Fróði Hansen fer at geva fólki góð ráð. Okkurt gott verður eisini til matna, og tí stendur Elisabeth Myllhamar fyri. Tiltakið byrjar klokkan 19.00 og kostar 280 krónur fyri hvønn.

# Fiskiloyvi fyri 2,2 mia kr.

**Sambært greining hjá Føroya Sparikassa eru tey fiskiloyvi, sum Tjóðveldisflokkurin vil hava í eina tilfeingisbúð, verd yvir tvær milliardir krónur**

FISKILOYVI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

2.214.000.000 kr.

Somikið stórt er virðið á samlaðu upphæddini, sum Føroya Landsstýri læt føroyski fiskivinnuni at umsita, tá lógin um vinnuligan fiskiskap varð sett í gildi á vári í 1994.

Tað eru tølini, sum framganga av eini greining, sum Føroya Sparikassi hevur gjørt, nú uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um broytingar í lógini fyri vinnuligan fiskiskap skal til viðgerðar í Løgtinginum.

Hóast fyrsta viðgerðin enn ikki hevur verið, so er eingin ivi um, at stóra talið fær tað at renna kalt eftir bakinum hjá fleiri av teimum, sum seinnu árini hava sagt seg vilja fremja endamálinum við einum tilfeingisgjaldi. Og ikki minni kalt man tað fara eftir bakinum hjá Føroyagrunninum og gomlu partaeigarunum í Vesturvón. Sambært grein aðra staðni á síðuni gevur greiningin hjá Sparikassanum nevnliga greiðar ábendingar um tveir sera favorablar handlar fyri keypararnar.

### Tað sum flotin ber

Notatið hjá Sparikassanum verður ikki greinað við serstakari frágreiðing um arbeiðshátt ella mannagongdir í hesum. Men lítið er tó at ivast í, at stórt greiningarbeiði liggur í hesum.

Sum viðmerking verður sagt, at tølini eru grundað á tað, sum flotin megnaði at forrentað sambært ársroknskapunum fyri 2005.

Í útgangsstøðinum eigur hetta tí at sýna tað virði, har keypari og seljari kunnu semjast um, tá handil verður framdur. Selja, tí hetta er markið, har tað loysir seg betri at selja enn at halda fram, og keypari tí ein handil, sum er dýrari enn hetta, verður sera trupul at forrenta. Í øllum førum, um roknað verður við óbroyttum fortreytum.

Í viðmerkingunum til uppskotið meta stillararnir, Torbjørn Jacobsen og Heidi Petersen, at á elið 10% av kvotuvirðunum eiga at koma í landskassan á hvørjum ári. Ella við øðrum orðum, so verður roknað við, at inntøkan hjá Landskassanum – við verandi fortreytum hjá flotanum – verður á leið 200 mió kr. um árið.

1. viðgerð av upskotinum hjá Torbjørn og Heidi hevur verið. Málið er í løtuni til viðgerðar í vinnunevndini hjá løgtinginum.

**Tølini hjá Sparikassanum**

| (øll virði í tkr.) | | Virði pr. skip v/loyvi | Virði pr. loyvi | Samlað fyri skip v/loyvi | Samlað fyri loyvi |
|---|---|---|---|---|---|
| Lemmatrolarar | 12 | 14.000 | 4.000 | 168.000 | 48.000 |
| Partrolarar | 28 | 18.000 | 12.000 | 504.000 | 336.000 |
| Línuskip | 25 | 12.000 | 10.000 | 300.000 | 250.000 |
| Garnaskip | 7 | 12.000 | 10.000 | 84.000 | 70.000 |
| Trolarar á landleiðini | 16 | 18.000 | 10.000 | 288.000 | 160.000 |
| Flakatrolarar | 4 | 150.000 | 75.000 | 600.000 | 300.000 |
| Nóta- og trolskip | 7 | 300.000 | 150.000 | 2.100.000 | 1.050.000 |
| | | | | | |
| | | | | 4.044.000 | 2.214.000 |

*Soleiðis sær yvirlitið frá Føroya Sparikassa út. Hetta sýnir virðið á kvotunum hjá parti av føroyska flotanum*



*Tað eru veldugar upphæddir, sum landsstýrið í 1994 læt føroyska fiskiflotanum upp í hendi at umsita*

# Eiler hevði rætta pulsin



*Talan var eftir øllum at døma um ein framúr góðan handil, tá Eiler Jacobsen í summar seldi Krúnborg fyri 356 mió kr*

**Eiler gjørdi tað gott. Men gomlu partaeigararnir í Vesturvón og ikki minst Føroyagrunnurin gjørdu tað lort, um handlarnir verða sammettir við greiningina hjá Sparikassanum**

SKIPASØLUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eiler Jacobsen seldi partafelagið Krúnborg fyri 356 mió kr. í juni mánaði í ár. Verður skuldin í felagnum - hon var við árslok 2005 upp á 87 mió kr. - tald við, var samlaða virðið á handlinum 443 mió kr. Ella við øðrum orðum er tað upphæddin, sum nýggju eigararnir skulu forrenta.

Og tað er nú væl meira enn tað, sum greiningin hjá Sparikassanum vísir. Sambært hesi er eitt nótaskip við veiðiloyvi vert á leið 300 mió kr., og tí er ikki løgið, at sildakongurin úr Skálavík segði talan vera um eitt tilboð, sum var ov gott at siga nei til.

Øðrvísi er í so máta við handlunum kring Vesturvón og JFK-samtakið. Vesturvón varð sambært givnum upplýsingum selt fyri 160 mió kr. Skuldin í felagnum var 20 mió kr., og tí var samlaða kravið til rentingina av keypinum 180 mió kr. Men keypararnir fingu nú meira enn ein flakatrolara við í keypinum. Vesturvón hevði nevnliga eisini tvey trolarapør, har hvørt skipið við veiðirættindum sambært Sparikassanum hevur eitt handilsvirði á 18 mió kr. Ella í alt 72 mió kr. Er hetta rætt, so var virðið av Vesturvón á leið 108 mió kr.

Og hjá JFK samtakinum stóð ikki so munandi betri til. Har var samlaði søluprísurin uppgivin til 120 mió kr., og saman við skuldini á 190 mió kr. gevur hetta 310 mió kr., sum onkursvegna kunnu forrentast. Tveir flakatrolarar á 150 mió fyri hvønn, geva eitt virði, sum táttar heilt væl í tær 310 milliónirnar. Men JFK-samtakið innihelt tó eisini so nógv annað. Eitt pelagiskt, tvey ísfiskaog eitt rækuloyvi vóru í felagnum, sum eisini átti næst størsta rávøruútflytaran í landinum. Nevnliga Kósavirkið. Og sammett við bæði Vesturvón og við tølini, sum Føroya Sparikassi nú leggur fram, er eingin ivi um, at handilin tá fór fram fyri væl lægri upphæddir.